# Stórur hávur – Shark Tale







Tað gongur hart fyri seg í nýggja filminum hjá Dreamworks, sum aftur hesa ferð hava gjørt ein framúr flottan animatións-skemtifilm.

Á havsins botni eru hávarnir teir stóru, og undir leiðslu av tí grumma Don Lino taka teir tað mesta av tí, sum er vert at taka. Trupulleikar stinga seg tó upp, tá eftirfylgjarin hjá Don Lino skal kjósast. Lenny er alt ov bleytur av sær, og Frankie hevur júst fingið okkurt hart í høvdið.

Lítli Oskar, sum er ein fiskur langt niðri í føðsluketuni sigur seg hava æruna av, at Frankie nú er dripin, og Lenn skal nú hevna beiggjan. Trupulleikin er bara, at Lenny er so góður av sær, og tá hann samstundis er plantuátari, ger hann eina avtalu við Oskar. Teir siga nú, at Oskar er ein veruligur háva-drepari, sum eisini hevur dripið Lenny. Fyri at hetta skal tykjast sannlíkt, roynir Lenny seg samstundis í leiklutinum sum delfin.

So Oskar kemur heilt upp á tindarnar, har hann samstundis skal velja ímillum, hvørt hann vil hava fittu Angle ella lekru Lola, men hetta er tó minsti trupulleikin. Don Lino hevur nevnliga sett Oskar á matarlepan!

At leggja røddir til ymsu leiklutirnar, hava leikstjórarnir fingið hópin av stórum nøvnum. Eitt nú Will Smith, Robert de Niro og Renée Zellweger.





**Frumsýning**
Fríggjadagin 10.12. kl. $23^{15}$ Leygardagin 11.12. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 12.12. kl. $22^{30}$

HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56
www.bio.fo




Fríggjadagin 10.12. kl. $18^{30}$ Leygardagin 11.12. kl. $18^{45}$
Sunnudagin 12.12. kl. $17^{30}$




Fríggjadagin 10.12. kl. $22^{15}$ Leygardagin 11.12. kl. $22^{15}$
Sunnudagin 12.12. kl. $21^{15}$




Fríggjadagin 10.12. kl. $20^{30}$ Leygardagin 11.12. kl. $20^{45}$
Sunnudagin 12.12. kl. $19^{30}$




**Undanfrumsýning**
Leygardagin 11.12. kl. $16^{45}$




Fríggjadagin 10.12. kl. $20^{00}$ Leygardagin 11.12. kl. $20^{00}$
Sunnudagin 12.12. kl. $19^{00}$